

ONS-nevndin á føroyska básinum saman við Heðini Mortensen, borgarstjóra og Ingibjørg Berg, kommunustjóra (Myndir: Tórshavnar kommuna)

# ONS-nevndin vitjaði føroyska tjaldið

Ingi Samuelsen

25.08.2014 - 21:17

Oljan.fo

Á ONS-messuni í Stavanger, fekk føroyska tjaldið á festivaløkinum í dag vitjan av nevndini fyri messuni.

Stjóri í ONS – Offshore Nothern Seas – er Leiv Johan Sevland, vinnulívsmaður og fyrrverandi politikari fyri Høgra. Hann var býráðslimur frá 1987 og borgarstjóri fyri Stavanger kommunu frá 1995 til 2011, og síðan 2012 hevur hann verið stjóri í ONS.

Leif Johan er bæði føroyavinur og havnavinur og er fastur fúsur til øll føroysk átøk í Stavanger.

Tað er VisitTórshavn, sum samskipar føroyska átakið á bryggjuni í Stavanger í sambandi við  oljuráðstevnuna. Tjaldið við føroyska básinum lat upp seinnapartin.

Hotel Føroyar stendur fyri matgerðini og Jens Marni, Hallur og Kristina standa fyri tónleikinum, so her er nakað fyri øll.

Fleiri norskar regiónir hava eisini tjøld í økinum eins og kendir oljuhøvuðsstaðir so sum Esbjerg, Aberdeen og Houston.

Sluppin Westward Ho liggur tætt við føroyska tjaldið inni í Vågen, og er opin fyri almenninginnum. Eisini verður móttøka umborð. Festivaløkið er opið til kl. 23.00 hvønn dag, meðan stevnan er.




